# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Tann danski hjálparpakkin eigur at røkka, men í Danske Bank vænta vit, at kreppan verður drúgv*
*Peter Straarup, stjóri*

# Læknar fyrireikaðu tilvildarlig hópdráp

**Tveir bretskir læknar eru ákærdir fyri tvær miseydnaðar bumbuatatsóknir í London og Glasgow seinasta summar**



*Eftir boðum frá teimum báðum læknunum bleiv ein brennandi bilur rendur inn í inngongdina til flogvøllin í Glasgow*
*Mynd: Reuters*

Tann 28 ára gamli Mohammed Asha og tann 29 ára gamli Bilal Abdulla komu fyri rættin London í gjár ákærdir fyri at at hava roynt at spreingja tvær bilbumbur í London og fyri eina miseydnaða sjálvmorðsbumbuatsókn at flogvøllinum í Glasgow í juni í fjør.

Í ákæruritinum eru teir báðir læknarnir ákærdir fyri at hava lagt báðar atsóknirnar til rættis og fyri at hava roynt at fullføra tær. Tá rættarfundurin í Woolwich Crown Court byrjaði, segði ákærin, Lonathan Laidlaw, at teir báðir ákærdu vóru limir í einum islamistiskum yvirgangsbólki, sum hevði sett sær fyri at elva til ótta og spjaðing í Bretlandi. Hann segði eisini, at teir báðir menninir brúktu bumbuálopini í London tann 7. juli í 2005 sum fyrimynd. Ákærin bað samstundis rættin hava í huga, at báðir teir ákærdu eru læknar.

- Teirra ætlan var at skipa fyri einari røð av atsóknum at sivilfólki og á støðum, har nógv fólk koma saman, segði ákærin.

Asha og Abdulla eru ákærdir fyri at hava fylt tveir bilar viðbenzindunkum, gassfløskum og jarnpettum í tí væl vitjaða leikhúsøkinum í London tann 29. juni í fjør. Bumburnar brustu ikki. Dagin eftir bleiv ein brennandi bilur rendur inn í høvuðsinngongdina til flogvøllin í Glasgow. Maðurin, sum koyrdi bilin, doyði av brunasárum.

Dagin eftir handtók løgreglan Abdulla, sum arbeiddi á Royal Alexandra-sjúkrahúsinum í Paisley, og seinni sama dag tók løgreglan Asha, sum var lækni á sjúkrahúsinum í Cambridge.

Bretsku myndugleikarnir siga, at tað var sera heppið, at ætlaninar hjá teimum báðum monnunum ikki kravdu ósek mannalív.



*Mohammed Aasha var lækni á sjúkrahúsinum í Calbridge*
*Mynd: Reuters*

# Inflasjónin í Zimbabwe 231.000.000 prosent

**Tað er eftir øllum at døma einki mark fyri inflasjónini í Zimbabwe. Tann seinasta almenna fráboðanin sigur, at nú er tann árliga inflasjónin komin upp á 231 milliónir prosent**

Tað er 20 ferðir meiri enn fyri bara einum mánaði síðani. Tá var inflasjónin 11,2 milliónir prosent, sum var met tá. Tann ovurstóra inflasjónin hevur fingið ST at biðja onnur lond veita Zimbabwe hjálp. Sagt verður, at tvær milliónir fólk hava tørv á neyðhjálp, og at tað talið fer upp um fimm milliónir um eitt hálvt ár ella so.

Zimbabwe hevur leingi verið herjað av politiskum stríði. Herfyri eydnaðist tað at fáa Robert Mugabe, forseta at ganga við til at lata andstøðuni ein part av valdinum, men ósemja um, hvør flokkur skal umsita hvørji málsøki, hevur steðgað tilgongdini.

Reuters skrivar úr Zimbabwe, at meðan politikararnir keglast um ráðstovur, standa fólk í bíðirøð á gøtuni fyri at veksla sínar pengar sum skjótast, tí virðið minkar fyri hvønn minutt, sum gongur. At inflasjónin er 231 milliónir prosent merkir, at tað, sum kostar 10 krónur at keypa í dag, kostar 23,1 milliónir krónur um eitt ár.



*Fólk í túsundatali eru flýdd undan neyðini í Zimbabwe. Her ein flóttafólkalega í Suðurafrika*
*Mynd: Polfoto*

## STUTT SAGT

### Hamas útilokar ikki val

Palestinska rørslan Hamas hevur nú boðað egyptiskum diplomatum frá, at hon er til reiðar at tingast við Fatah-rørsluna um at halda val í teimum palestinsku sjálvstýrisøkjunum tíðliga næsta ár. Tað skrivar ísraelska blaðið Ha'aretz.

Egyptiskir diplomatar hava virkað sum semingsmenn millum Hamas og Fatah. Í vikuni høvdu egyptisku diplomatarnir fund við umboð fyri Hamas, og aftan á fundin segði diplomaturin Omar Suleiman, at Hamas er sinnað at tingast við Fatah um at skipa fyri vali til várs.

Viðurskiftini millum Hamas og Fatah hava verið spent, síðani Hamas tók valdið í Gazageiranum í juni í fjør. Tað hendi, eftir at Mahmoud Abbas, forseti, sum er úr Fatah, hevði upployst stjórnina hjá Hamas og skipað eina nýggja stjórn uttan Hamas-ráðharrar.

Valskeiðið hjá Mahmoud Abbas rennur út tann 8. januar næsta ár. Valskeiðið hjá palestinska tinginum endar ikki fyrr enn í januar í 2010.

### Ákæra í stórum bankaráni slept

Í Norðurírlandi hevur ríkisákærin slept ákæruni ímóti einum fyrrverandi bankamanni, sum var undir illgruna fyri at hava arbeitt saman við nøkrum ránsmonnum, sum rændu 26,5 milliónir bretsk pund úr einum banka í Belfast í desember í 2004.

Tá var hetta tað størsta bankarán nakrantíð, sigur BBC.

Chris Ward arbeiddi í Northern Bank í Belfast, tá bankin bleiv rændur, og hann varð lagdur undir at hava hjálpt ránsmonnunum.

Men Ward helt uppá, at hann bleiv noyddur til at hjálpa ránsmonnunum og vísti á, at teir høvdu hótt við at beina fyri bæði honum, konuni og børnunum, um hann ikki hjálpti teimum.

Verjin hjá Chris Ward siugur, at teir fara nú at fyrireika endurgjaldskrav ímóti myndugleikunum.